# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Koyr á Danmark

**Um góða viku kann nýggi stórfilmurin um donsku dynamit-dreingirnar upplivast á hvíta løriftinum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í tíðini áðrenn Rás Tórshavn, Televarp og aðrar fleirkanal-møguleikar. Og áðrenn føroyska fótbóltslandsliðið trein á altjóða pallin við brakinum í Landskrona, vóru tað donsku dynamit-dreingirnir, sum bergtóku føroyingar.

Brotssparkið hjá Allan Simonsen á Wembley í '83. Bjargingin hjá Ole Kjær í sama dysti. Málini hjá Brylle og Elkjær móti Belgia í '84 og skrædda brókin hjá Elkjær eftir misnýtta brotssparkið í EM-hálvfinaluni. Málið hjá Laudrup móti Uruguay í '86, fríspælingin hjá Jesper Olsen av Butragueno. Og ikki minst ófatuligi EM-sigurin í '92.

Hetta eru millum annað løturnar, sum kunnu endurupplivast í filminum, ...Og det var Danmark, sum um góða viku hevur premieru á hvíta løriftinum. Fyrst og fremst er talan um fótbóltsminni, har stóru hetjurnar eiga aktivan lut í filminum. Men eisini er talan um ein film, har øll mentanin kring danska fótbóltslandsliðið verður viðgjørd. Ein mentan, sum eisini spennir um tónleik – líka frá Dura Duran til væl kendu Re-Sepp-Ten.

Filmurin verður eisini sýndur her í Føroyum. Frumsýningin í Havnar Bio verður leygardagin 9. mai.




*Skrøddu brøkurnar hjá Preben Elkjær eru kanska kendasta myndin frá EM-kappingini í 1984. Men hóast mista finalusessin, so var hetta fram um aðrar kappingin, har dynamitt-dreingirnir spældu seg inn í donsku fólkasálina*

# Átta klárar til EM-hópin

**Landsliðsvenjararnir hava nú tikið átta spælarar út til EM-hópin hjá føroyska kvinnulandsliðnum í flogbólti**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

15. til 19. mai verður EM-undankappingí Føroyum. Føroysa kvinnulandsliðið í flogbólti skal tá royna seg móti Liktenstein, Írlandi, Skotlandi og Liktenstein.

Fyrireikingarnar eru sálvandi langt síðani byrjaðar, og nú eru fyrstu átta spælararnir í hópinum valdar. Um vikuskiftið boðaðu landsliðsvenjararnir, Magnus Tausen og Niclas Joensen frá, at Sólvá Dimon (TB), Birita Joensen (KÍF) og Karin Mikkelsen (SÍ) eru partur av hópinum. Og í gjárkvøldið fingu so fimm aðrar somu boð. Tær eru Annika á Stongum (SÍ), Margit G. Joensen (Mjølnir), Anna Maria M. Kruse (ÍF), Sólgerð Henriksen (Dráttur) og Kate Kate Kalsø (Mjølnir).

Í alt skulu 12 spælarar takast út til hópin.

*Um góðar tvær vikur skulu føroyska flogbóltskvinnurnar spæla EM-undankapping á heimavølli*



## Riise er til reiðar

**Størsta kjakevnið undan seinnu hálvfinaluni millum Chelsea og Liverpool er, um Rafael Benitez vil brúka John Arne Riise, sum í fyrru hálvfinaluni spældi trumfin yvir Chelsea**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við sjálvmálinum eftir 94 minuttum var John Arne Riise í fokus fyr alt annað enn tað góða, tá Liverpool og Chelsea spældu 1-1 í fyrru hálvfinaluni sínamillum.

Í kvøld er returdysturin á Stamford Bridge, og stóra kjakevnið er, um John Arne Riise hesa ferð verður at síggja á vinstra bakki hjá Liverpool.

Har hevur Fabio Aurelio fyri tað mesta átt sessin seinastu tíðina, men hann er heilt víst ikki við, nú hann dregist við skaða.

Tað reisir spurningin um Riise. Ein møguleiki, sum helst ikki er heilt ósannlíkur, er, at Riise fer beint inn á vinstra bakk. Hinvegin kann Benitez eisini velja at umskipa miðverjuna, soleiðis at Carragher fer út á annan bakkin.

Hjá Chelsea kann Avraham Grant fegnast um, at Frank Lampard aftur er tøkur. Michael Ballack sýndi sín stóra týdning fyri liðið, tá hann skoraði bæði málini í sigrinum á Manchester United, og so er spurningurin, um teir báðir stórspælararnir saman megna at finna stórspælið, nú felagið mest av øllum hevur tørv á hesum.